

# Rútmiska kórið Glymur 25 ár

Í ár kann sangkórið Glymur hátíðarhalda sín 25 ára føðingardag. Hetta verður gjørt við eini konsert í Müllers pakkhúsi leygardagin 30.mai klokkan 16.00.

Skráin er fjølbroytt við bæði kendum og nýggjum føroyskum sangum, umframt teimum norðurlendsku og ensku vit syngja.

Kórið hevur leingi verið stjórnað av Ingun Hentze.

Glymur hevur verið úti í heimi og hildið konsertir nakrar ferðir hesi 25 árini, eitt nú í Danmark, Íslandi, Álandi, Grønlandi, Hetlandi og Bulgaria. Glymur hevur útgivið tvær fløgur.

Konsertin verður sum nevnt leygardagin kl.16.00.

# Tarira framførir Heimstónar í stásiligum hølum



Fríggjadagin 29. mai 19:00 hevur Tarira konsert í Müllers Pakkhúsi, og leygardagin 30. mai 17:00 verður konsert í Mentanardeplinum í Runavík.

Í tíðindaskrivið sigur kórið, at tey gleða seg at royna nýggju hølini í Runavík, og ætla tey at fáa tað besta burturúr ljóðeginleikunum, ið hølini bjóða.

Hinvegin eru Tarira og Müllers Pakkhús gamlir vinir, og helst eru fá høli, ið eru so væl egnað til tað slagið av kenslubornum tónleiki, ið Tarira hevur lagt seg eftir seinastu árini. Tað var eisini upplagt, at konsertin í sambandi við útgávuna av fløguni Døgg varð hildin her í fjør summar.

Leitað verður um allan heim eftir íblástri. Við støði í Føroyum verður vitjað í okkara grannalondum, Íslandi, Svøríki, Finnlandi og Danmørk. Farið verður víðari eystureftir til Eysturríkis og Russlands og heilt yvir til víðagitna japanska tónaskaldið Toru Takemitsu (1930-1996) og tvørtur um Kyrrahavið til Los Angeles, har vit syngja ein yndisligan satsavungastjørnuskotinum Eric Whitacre (føddur 1970).

**Rd.**







Vit sóknast eftir

Verkstaðsleiðara/blikksmiði

Til blikksmiðjuna í Havn, søkja vit ein verkstaðsleiðara ið skal standa fyri móttøku og avgreiðslu av øllum vanligum innkomandi jarn og blikksmiðjuuppgávum.

Ætlanin er, at tú verður settur sum ábyrgdarhavandi verkførari fyri blikksmiðju okkara, og kemur at avgreiða størri og smærri ordrar frá kundum, eins og tú kemur at hjálpa til við at samskipa verkstaðsarbeiði til okkara størru verkætlanir.

Tú verður sum ábyrgdarhavandi fyri verkstaðnum, ein partur av leiðslutoyminum hjá Demich, men má eisini rokna við at skula brúka ein part av tíðini til verkstaðsarbeiði sjálvur. Harumframt skalt tú kunna hjálpa øðrum sveinum og lærling-um við at loysa uppgávur innan blikksmíð.

Tað er tí umráðandi, at tú ert ein royndur blikksmiðjur og/ella at tú hevur ein góðan førleika innan hetta øki. Tað er tó ikki ein ófrávíkilig treyt, at tú er útbúgvin innan hetta øki, um tú í staðin hevur eina líknandi útbúgving ella tær røttu royndirnar.

Vit bjóða tær

Eitt sjálvstøðugt og avbjóðandi starv í eini fyritøki sum er í støðugari menning.

Eitt persónliga mennandi starv um tú dámar at hava ábyrgd og at fáast við ymisk menniskju. Eitt fakliga mennandi starv fyri ein góðan handverkara.

Góðar og skipaðar arbeiðsumstøðir á eina nýmótans og framkomnari blikksmiðju.

Vit vænta at umsøkjari

- Er handverksliga væl fyri
- Antin hevur útbúgving sum blikksmiðjur ella hevur royndur innan hetta øki
- Er førur fyri at seta seg í respekt og at halda onnur fólk í gongd
- Dugir væl at fáast við kundar og við onnur starvsfólk hjá Demich
- Hevur vanligan til góðan teldukunnleika
- Hevur vanligt koyrikort

Lønar og setanartreytir

Løn og treytir sambært førleikum og ábyrgd og annars eftir nærri avtalu.

Umsóknarfreist

Umsóknarfreistin er 15. juni 2009. Miðað verður eftir at seta starvið skjótast gjørligt, men vit bíða eisini um neyðugt eftir rætta persóninum.

Umsóknir saman við prógvum, CV og øðrum verða viðgjørdar í trúnaði og skulu sendast til:

P/F Demich, postboks 378
FO-110 Tórshavn,
Att: Torbjørn Hansen.

Um tú hevur spurningar ert tú vælkomin at seta teg í samband við

Torbjørn Hansen
torbjorn@demich.fo
Tel. 309310/211071

Demich P/F, Tórshavn
Postboks 378 - Stiðjagøta 2
Telefon +298 309 310
Fax + 298 309 311

Demich P/F, Vágur
Marknoyrarvegur 36
Telefon +298 373 535
Fax + 298 373 565

Demich P/F, Saltangará
Heiðavegur 80
Telefon +298 444 500
Fax + 298 445 501

demich@demich.fo • www.demich.fo

demich
hiti | vatn | sanitet